

## Símun skoraði í Intertoto-dysti

Leygardagin spældi íslendska felagið Keflavík í Intertoto kappingini hjá UEFA. Dysturin var á heimavølli ímóti írska liðnum Dungannon Swifts, og íslendska liðið vann heili 4-1. Føroyski spælarin Símun Samuelsen setti gongd á málskjótingina, tá ið hann í 16. minutti skoraði til 2-01. Keflavík skoraði trý mál afturat, áðrenn írska liðið svaraði aftur við einum máli stutt fyri leiklok. Símun Samuelsen byrjaði á vøllinum, og spældi fram til fimm minuttir fyri leiklok, tá ið hann varð skiftur út.

## FCK leitar í Svøríki

FC Keypmannhavn keypti í farnu viku svenska álopsspælaran Fredrick Berglund frá Esbjerg. Berglund hevur verið millum bestu álopsspælararnar í Danmark seinastu tvey árini, og nú eru donsku meistararnir farnir avstað við honum. FCK er eftir øllum at døma ikki liðugt við at leita eftir svenskum styrki, tí nú skrivar Aftonbladet, at FCK er sinnað at keypa vinstra bakkin hjá IFK Gøteborg, Oscar Wendt, fyri 6,5 milliónir krónur.

B68-B36 0-1 (0-0):

# Gestirnir vóru effektivari



*Talan var um væl vanda deyðbóltsstøðu, sum vissaði B36 sigurin. Ein sigur, sum eisini ber við sær, at meistararnir enn hanga við í oddinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

*B68*

*B36*

**Talan gjørdist ongan tíð um spruttandi álopsfótbólt, men eftir eina væl vanda deyðbóltsstøðu eydnaðist B36 at skora avgerandi málið 10 minuttir fyri leiklok**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað varð sum so sagt hampuliga væl í leikskránni hjá B68. Har ljóðaði staðfestingin, at tað uttan iva varð truplari hjá B68 at spæla heimadyst móti B68, sum júst hevði kiksað við 2-2 javnleiki móti VB/Sumba, heldur enn at spæla útidysti móti einum KÍ-liði, sum júst hevði vunnið 7-1 móti sama VB/Sumba.

**Bundu um verjupartin**

Sannleikin í hesum kom í øllum førum greitt til sjóndar í hugburðinum, sum B36 hevði til dystin. Verjandi føroyameistararnir vóru fullgreiðir um, at ráð ikki vóru til fleiri kiksarar móti niðaru støddu liðunum, um stevið við oddinum skuldi haldast, og tí varð ansað væl eftir, at eingi býtt mistøk vórðu framd í dystinum.

Tá heimamenninir eisini lógu hampuliga djúpt á vøllinum, gav hetta úrslit í nógvum spæli á miðjum vølli, meðan møguleikarnir at skora vóru hampuliga fáir. Ikki minst, tí skróvturri vøllurin gjørdi tað sera trupult at seta menn av, og ikki so sjáldan hekk leðurkúlan eftir, tá snaringar vórðu royndar.

B36 megnaði tó í einstøkum førum at skapa vandastøður við at spæla eftir miðásini, meðan tað hjá B68 serstakliga var við uppspæli í vinstru síðu, har ein væl upplagdur Øssur Hansen var títtur í avbjóðingunum.

**Deyðiligur deyðbóltur**

Fyrstu løtuna av seinna hálvleiki kundu vertirnir kanska eisini lagt seg á odda. Í einum trimum førum var heilt nær við, at mál spurdist burturúr, men Jákup Mikkelsen stóð har, sum hann skuldi standa, tá harðast leikaði á, og so líðandi fekk B36 tiltvingað sær yvirvágina í dystinum.

Tað tóktist eisini geva meira sprell í B36-álopið, at Símun Hansen varð sendur á vøllin fyri Obi seinastu 25 minuttirnar. Sandoyingurin tóktist ikki hava somu trupulleikar av undirlendinum, sum fleiri av viðspælarunum, og ta ferðina var talan eisini um heilt góða skotroynd, sum tó smeyg sær dygst omanfyri tvørtræið.

Og Símun átti eisini sín lut í málinum, sum gav B36 øll stigini. Talan var kanska fyrst og fremst um eitt mál, sum staðfesti týdningin av deyðbóltum. B36 tók stutt hornaspark til Santos, sum langaði bóltin móti handara stólpa. Har stóð Símun til reiðar at senda inn fyri aftur, og so kundi Sylla stúta bóltin í kassan.

**Botnbrak í Vági**

Seinastu løtuna tók B36 fólkið langt aftur, og útskiftingarnar bendu greitt tann vegin, at leiðslan skuldi verjast.

Tann setningurin eydnaðist eisini, og soleiðis helt B36 fast í fjarstøðuni upp til oddin, sum altso enn er fýra stig burturi. Í so máta skerst ikki burtur, at B36 iðraði seg um javnleikin fyri viku síðani, tá mest sum allir møguleikar vórðu misnýttir. Sunnudagin var liðið munandi meira effektivt í so máta, og tí mundi sigurin helst kennast eyka søtur. Komandi vikuskifti er heimadystur móti ÍF á skránni, og enn ein sigur her kann føra B36 heilt nær oddinum, um væl vil til.

B68 skal tá á jóansøku í Vági, og tað bendir á ein sannan botngysara, har vinnarin kann skapa sær nakað av luft.

# Julian er svangur eftir landsliðsbólti

**Miðvallarstríðsmaðurin var vónbrotin av tepra tapinum, men staðfestir, at eyguni nú mugu vendast móti komandi uppgávuni, sum verður í Vági á jóansøku**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Julian Johnsson duldi ikki fyri, at talan var um stórt vónbrot, tá teir noyddust stigaleysir av Svangaskarði sunnudagin.

– Eg skal ikki siga, at talan var um ein so øgiliga góðan fótbóltsdyst. Men vit spæla fult upp til teir, og vit skapa eisini nakrar møguleikar. Vit skora bara ikki upp á tað, sum vit skapa, meðan teir skora, tá fáa ein veruligan møguleika, og so er søgan ikki stórt longur enn tað sama. Og tað er kanska eisini akkurát munurin á einum liði í ovaru hálvu og einum botnliði.

Hóast hetta, so heldur Julian avgjørt ikki, at toftamenn hava nakra orsøk at fella í fátt.

– Avrikini seinastu vikurnar hava avgjørt verið góðkend, men marginalarnir vilja líka sum ikki í okkara part. Hinvegin, so vita vit, at tað serliga eru ÍF og VB/Sumba, sum vit skulu kappast við í botninum, og fyrst og fremst ræður um at halda hesa aftanfyri. Sjálvandi eru tað framvegis 42 stig eftir at spæla um, men talan verður kortini um serstakliga týdningarmiklan dyst, tá vit spæla í Vági komandi vikuskifti. Teir hava heimavøll, og tað er jóansøka, so tað verður uttan iva ein sera harður dystur, heldur Julian.

**Hugsar enn um landsliðið**

Seinasta árið hevur Julian verið burtur frá fótbóltinum við krossbandsskaða, og enn hevur hann bara einar fýra dystir í beinunum, síðani hann aftur kom á vøllin.

Men hóast hetta, so ivast stríðsmaðurin ikki í, at málið hjá sær aftur er at koma á landsliðið.

– Tað er sjálvandi ikki til mín at gera av, men sjálvandi er tað málið. Sjálvandi restar enn nakað, áðrenn dystarvenjingin er nóg góð, men tað er bert háttur at fáa hetta upp á pláss. Og tað er við venjing, sigur Julian. Við 61 landsdystum á kontini er Julian tann spælarin, sum eigur triðju flestar dystir fyri Føroyar.